# Hetta er bara sakin

**Havnarmaðurin sigur seg stórtrívast á Skála, har avbjóðingarnar eru stórar, og har hann higartil hevur verið fastur fúsur á liðnum**

SKÁLA
*Jóannes Hansen*

22 ára gamli Pætur Dam Jacobsen var ógvuliga væl nøgdur sunnudagin. Tað var heldur ikki so løgið. Undan ferðini til Gøtu hevði hann ongantíð skorað mál í landskappingardysti í bestu deildini. Tá ið teir fóru undir brúsu í GÍ húsinum hevði hann skorað tvær ferðir og harvið átt sín stóra lut í, at Skála hevði fingið trý stig.

– Hetta var bara super. Vit arbeiddu væl saman, og sjálvandi var tað ikki verri, at tað eydnaðist mær tvær ferðir at vera málskjútti.

*Fyrra málið minti nógv um tað hjá Hanusi Thorleifsson í Klaksvík?*

– Eg haldi hansara mál var betri. Bólturin kom út frá, eg tamdi við høgra og royndi við vinstra. Ferðin var ikki so stór, men bólturin fór umvegis stólpan og í netið.

*Og seinna málið?*

– Innskifti Rói Jacobsen spældi til Jónhard, og tá ið hann legði til mín, var eg rættuliga einsamallur í brotsteiginum. Bogi Gregersen var eisini í brotsteiginum, men eg royndi móti málinum, og eg var heppin.

*Hvussu trívst tú á Skála?*

– Har er gott at vera. Fólkið er fitt, og venjingarnar eru góðar og væl skipaðar. Í fleiri dystum hava vit havt marginalirnar við okkum. Hvussu tað fer at hilnast valdast um, hvussu tað fer at roynast næstu ferðirnar, tá ið vit skulu spæla móti toppliðunum.

*Hvussu bar tað til, at tú flutti inn á Skála at spæla?*

– Eg havi havt tað gott á Argjum, men mær longdist eftir at royna at spæla 1. deildarfótbólt. Tí valdi eg at royna á Skála, og tað havi eg avgjørt ikki iðrað meg um, sigur Pætur Dam Jacobsen, sum skoraði tvær ferðir í Gøtu sunnudagin.

### Fakta um dystin

GÍ-Skála 2-3 (1-0)
1-0: Súni Olsen br 16.
1-1: Milic Curcic 53.
1-2: Pætur Dam Jacobsen 64.
2-2: Súni Olsen 67.
2-3: Pætur Dam Jacobsen 86.
Dómari: Páll Augustinussen
GÍ: Marcel Dawid — Jónreid Dalheim (Poul Arni Jacobsen, 87.), Atli Gregersen, Robert Rzeczycki, Hanus Jacobsen (Poul Henning Jacobsen,77.) – Áslakur R. Petersen, Sámal Joensen, Kaj Ennigarð (Símun Louis Jacobsen, 49.), Súni Olsen, Hans Pauli Petersen - Krzystof Popczynski.
Gult kort: Súni Olsen, Sámal Joensen, Atli Gregersen og Robert Rzeczycki
Skála: Vlada Filipovic – Bárður Danielsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Iulian Florescu – Bjarni Jørgensen (72.: Rói Jacobsen), Pauli G. Hansen, Nenad Stankovic, Pætur Dam Jacobsen – Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen.
Gult kort: Pauli G. Hansen, Pætur Dam Jacobsen, Bárður Danielsen, Bogi Gregersen

fekk um endan aftur. Súni Olsen javnaði við fínum stútara, eftir at Áslakur R. Petersen hevði lagt innfyri, og so var aftur púra opið.

Taklingarnar vóru nógvar og ikki altíð so vakrar. Tað bar við sær, at síðuspælarin hjá Skála í høgru, Bjarni Jørgensen, noyddist skaddur av vøllinum.

So var tað, at Pætur Dam Jacobsen enn eina ferð gjørdi um seg, og hóast GÍ síðstu løtuna tveitti alt fram, so noyddust teir enn eina ferð at ásanna – fyri fjórðu ferð í ár – at teir høvdu tapt tepurt, og at Skála telist millum toppliðini, meðan GÍ einki lið hevur undir sær á støðutalvuni.

# Klaksvíkingar spenna seg út

**Róðrarfelagið hevur ein mánað undan Norðoyastevnu sett danskan venjara, sum er kendur frá altjóða kappingum, har hann eitt nú hevur verið við til at vinna HM og OL**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Áhugin fyri kappróðri sigst vera stórur og vaksandi í Klaksvík. Síðani gylta árið í 2001, tá ið teir vunnu trý FM, og tá ið ein onnur manning var tætt við, so hevur hetta tó ikki sæst aftur í úrslitunum.

Men nú hevur Klaksvíkar Róðrarfelag tikið nýtt og púra óvanligt stig í strembanini eftir at røkka longri upp á stiganum. Á tíðindafundi seinnapartin leygardagin varð boðað frá, at felagið hevur gjørt samstarvsavtalu við ein dana um, at hann skal taka sær av at venja allar manningarnar hjá felagnum.

Maðurin er 26 ára gamli Stephan Mølvig. Í fyrsta umfari man hetta ikki siga teimum flestu so nógv, men heimasíðan hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, krf.fo, veit at siga, at talan er ikki um hvønn sum helst. Hesin Stephan Mølvig hevur verið partur av gullfýraranum hjá dønum, og tá ið hetta hugtakið verður nevnt, fara klokkur ivaleyst at ringja hjá róðraráhugaðum.

Gullfýrarin hevur seinnu árini vunnið mong heiðursmerkir í kappingum kring allan knøttin. Eitt nú vunnu teir HM fyri fýrarar uttan stýrimann í 2002 og 2003.

Undan olympisku leikunum í Athen í fjør sá tað einki serligt út. Gullfýrarin hevði torført við at finna stevið, og tað, sum hevði sæð út til at hava verið trygg gullkróna, varð vorðin til stórt spurnartekin.

Tað hevði við sær, at venjarin royndi at styrkja um manningina. Hetta gekk út yvir Stephan Mølvig, sum misti plássið umborð á bátinum eitt skifti. Men avrikini gjørdust ikki betri, og so gjørdi venjarin av, at maðurin, sum nú er komin til Klaksvíkar, skuldi fáa nýggjan møguleika, og tað mundi hann ikki iðra.

Í Athen livdi gullfýrarin upp til tað, sum navnið legði upp til. Teir vunnu sannførandi fremsta plássið og harvið gullkrónurnar, sum tey bæði HM heitini høvdu lagt upp til, at teir skuldu vinna.

Gullkrónur í HM og OL koma ikki av sær sjálvum. Eitt veldugt arbeiði liggur aftanfyri. Tí kom tað ikki óvart á, at fleiri av manningini aftaná OL boðaðu frá, at teir fóru ikki at halda fram. Arbeiði og lestur verða nú tikin framum mongu tímarnar á vøtnum og í styrkisvenjing.

Tey, sum leingi hava verið í sovornum umhvørvi, eru pirkaði av kappingarhugi, og nú hevur Stephan Mølvig tikið av tilboðnum um nýggjar og heilt øðrvísi avbjóðingar enn tær, sum hann higartil hevur verið partur av. Hann skal vera venjari í Klaksvík! Hóast hann ikki hevur royndir í føroyska bátinum, so verður roknað við, at íkastið hjá honum verður stórt, tá ið tað snýr seg um fysiska venjing og ikki minni, tá ið tað snýr seg um mentala ella sinniliga venjing.

Umframt at venja allar manningarnar hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, so skal nýggi maðurin í Klaksvík vera partur av manningini umborð á 8-mannafarinum Nevinum Reyða.

Í 2002 hevði Klaksvíkar Róðrarfelag venjara til allar manningarnar. Tær royndirnar siga teir vóru sera positivar, og nú verður í spenningi bíðað eftir, hvussu tað fer at síggjast aftur í huginum og avrikunum, at teir hava sett nýggjan og í alheims høpi kendan róðrarvenjara.

## formuladeildin

| | dystir | v | | j | | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 8 | 2 | 6 | 13 |
| 2 HB | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 15 | 8 | 7 | 12 |
| 3 Skála | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 13 | 7 | 6 | 11 |
| 4 ÍF | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 10 | 9 | 1 | 11 |
| 5 NSÍ | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 9 | 8 | 1 | 9 |
| 6 KÍ | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 10 | 12 | -2 | 7 |
| 7 VB | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 3 | 6 | -3 | 7 |
| 8 TB | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 6 | 10 | -4 | 5 |
| 9 EB/Streymur | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 4 | 11 | -7 | 5 |
| 10 GÍ | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 9 | 14 | -5 | 3 |

### Støðan, 2. deild menn

| | dystir | v | | j | | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 7 | 1 | 6 | 3 |
| 2 LÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 6 | 3 | 3 | 3 |
| 3 AB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 4 B68 | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 Royn | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 6 B71 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 7 B36 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 8 FSV04 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 9 Sumba | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 3 | 6 | -3 | 0 |
| 10 GÍ | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 7 | -6 | 0 |

# Máltindurin

**Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| Súni Olsen | GÍ | 5 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 4 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 4 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 4 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 3 |
| Hans á Lag | HB | 3 |
| Atli Danielsen | KÍ | 3 |
| Bogi Gregersen | Skála | 3 |
| Óli Johannesen | TB | 3 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Uni Arge | HB | 3 |
| Súni Fríði Barbá | AB | 2 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 2 |
| Fróði Joensen | LÍF | 2 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 2 |
| Petur Sjúrðaberg | LÍF | 2 |